KJAK

Fólksins ogn – Seinni partur



HALGIR WINTHER POULSEN

Advokatur

Fiskivinnan

Eftir at fiskimarkið varð flutt út á 12 fjórðingar í 1959 fingu vit ta fyrstu føroysku lógina um fiskiskap innan fyri 12 fjórðingar, ið bannaði útlendskum fiskiførum at fiska á hesum øki, og setti forboð fyri troling innan fyri 6 fjórðingar. Í 1964 kom nýggj lóg, eftir at markið varð sett úr beinum grundlinjum, men enn var stórt sæð bert talan um forboð fyri troling á landleiðini. Havið var enn "frítt", ikki var neyðugt við øðrum reguleringum, føroyingar kundu stórt sæð óhindraðir fiska á øllum høvum.

Eftir ta kollveltandi broytingina í 1977, tá fiskimørkini vórðu flutt út á 200 fjórðingar, og stórt sæð allur føroyski fjarfiskiflotin varð tvingaður inn í heimasjógv, kom fyrsta lógin við reguleringsheimildum í 1978. Her varð ásett, at landsstýrið eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd kundi seta reglur fyri fiskiskapi á landleiðini. Talan var í høvuðsheitum um tekniskar reguleringar og friðingar og ikki um at seta krøv um fiskiloyvi ella aðrar avmarkingar av atgongd til at reka fiskiskap. Hesar avmarkingar byrjaðu við kunngerð nr. 85 frá 5. mai 1987 "um veiðuloyvi til føroysk fiskiskip". Við heldur ivasamari heimild í lógini frá 1978 varð nú sett krav um fiskiloyvi fyri øll fiskifør større enn 20 brt (í 1989 lækkað til 5 brt og í aftur 1989 broytt til eina kombinatión av longd ganga breidd), tó soleiðis, at "Føroya landsstýri sendir út fiskiloyvi fyri árið 1987 og fylgjandi ár til teirra, sum hava havt fiskiloyvi og/ella landað veiðu..... Einki skip kann fara til fiskiskap uttan veiðuloyvi".

Her varð fyri fyrstu ferð í okkara fiskivinnusøgu ásett, at tað kravdist loyvi frá tí almenna at fara til fiskiskap, ein vinnuvegur, ið hevði verið einum og hvørjum frítt at reka í øldir. Tað hevði kanska verið skilabetri, um ein so djúptøk, men óivað neyðug, regulering av einari áður frælsari vinnu hevði havt greiðari lógarheimild, og at lógin hevði ásett greiðari reglur fyri reguleringini.

Longu í 1989 varð ásett í nýggjari kunngerð at "Umsóknir um veiðuloyvi verða at senda til Føroya Landsstýri", eftir øllum at døma eisini tey, ið høvdu fingið fiskiloyvi sendandi frá landsstýrinum fyri "fylgjandi ár". Tað sama endurtók seg við nýggjari kunngerð í 1993. Við hesum eru vit komin til núgaldandi lóg um vinnuligan fiskiskap, lóg nr. 28 frá 10. mars 1994. Meðan 1978-lógin var um fisk, eitur tað nú "livandi tilfeingi", ið tó ikki fevnir um hval, kóp, fugl og alifisk!

Í stuttum kann sigast, at lógin var mest at líkna við ein fløkjustamp tá hon kom, og hon er ikki vorðin minni fløkt av øllum teimum broytingum, ið hon hevur fingið hesi átjan árini, eini fjøruti tilsamans. Her skal ikki verða gjørd nøkur roynd at gjøgnumganga lógina, pláss er ikki til tess. Tó skulu verða nevnd nøkur dømi úr lógarviðmerkingunum, ið eru til skjals í Løgtingstíðindi fyri 1993 á síðu 385 og fram, so kann einhvør døma um, í hvønn mun hesar ætlanir eru roknar:

"Fyrsta kravið er, at ikki verður veitt meira enn stovnarnir tola á varandi, burðardyggum grundarlag. ..."Tað hevur stóran týdning, at vinnan kennir treytir og karmar eitt rímiligt tíðarskeið framyvir. ..Skipanin skal vera greið og løtt og einføld at umsita. ..Tað hevur størsta týdning, at vinnan góðtekur skipanina og at skipanin stendur á tryggari lógargrund. ...nevndin er á einum máli um at skjóta upp, at gjørd verður ein skipan við egnum handilskvotum, roknaðar út frá mest loyvdum veiðinøgdum (TAC) fyri stovnarnar, sum verða ásett fyri 5 ár í senn. ..Fyrimunurin við tílíkari skipan er, at vinnan yvir fleiri ár veit, hvussu nógv er til taks. Tað er tí avgerandi, at hildið verður fast um 5 ára mest loyvdu veiðina sjálvt um veiðilíkindini broytast. Ein stórur fyrimunur við hesi skipan er, at politisku myndugleikarnir fara frá smálutastýring og til at seta karmar. Innan fyri tann karm, sum lívfrøðiligu fortreytirnar seta, verður vinnan sjálv at finna fram til hvør samanseting av fiskiflotanum, ið roynist/hóskar best. ...Skotið verður upp, at teir persónar og tey feløg, sum fáa kvoturættindi, varðveita hesi í 20 ár. Møguleiki er eftir umsókn at fáa longt rættindini út um tey 20 árini. Hugsanin er, at kvoturættindini ikki verða veitt sum ogn, men heldur sum ein tíðaravmarkað konssesión, sum kann takast aftur ella ganga út. Hinvegin er neyðugt at hava eina skipan, sum loyvir vinnuni at gera langtíðarætlanir, tí galda kvoturættindini í minsta lagi 20 ár."

Kvotuskipanin vísti seg ikki at rigga serliga væl, og longu á vári 1996 vórðu grundleggjandi broytingar gjørdar í lógini, m.a. við fiskidøgum í staðin fyri kvotur. Talið av veiðiloyvum varð fryst fast til tað, sum tað var 1. januar 1995, og fiskidagarnir vóru í stóran mun umsetiligir. Meðan eingin tíðaravmarking sær út til at vera í 1996-lógini, varð tann broytingin gjørd í 1998, at fiskidagarnir vóru í gildi í 10 ár "í senn", og at teir kundu umsetast upp til 10 ár "í senn", ella við øðrum orðum ein "rullandi skipan".



Í 2007 sær út til at "politiska skipanin" var komin á trota. Nú kom enn eitt uppskot til lógarbroyting, ið, sum endamál hevði "at hava eina lóg, sum setir greiðar karmar um, hvussu høvuðsvinna og høvuðstilfeingi okkara verður skipað og umsitið". Skotið verður upp og samtykt við 28 atkvøðum á tingi, at øll veiðiloyvi ganga út tann 1. januar 2018, men "verða endurnýggjað, um loyvishavari framhaldandi lýkur treytirnar sambært lógini og í veiðiloyvi og fiskiloyvi". Hesi endurnýggjaði loyvi hava gildi í 5 ár, men her stendur ikki "í senn". Í viðmerkingunum stendur kortini, at "ætlanin er at endurnýggja loyvini 5. hvørt ár, um loyvishavarin framhaldandi lýkur treytirnar....", so tað er heldur ógreitt, um hesi fimm ára loyvini eru rullandi ella ikki.

Væntandi var, at nú bar til at fáa í lag eina veruliga og grundleggjandi viðgerð av allari fiskivinnulóggávuni, men síðan 2007 er einki hent í so máta uttan at tíggju lógarbroytingar eru samtyktar síðan tá, og nú sær eftir almenna kjakinum at døma út til, at ósemjan um fiskivinnupolitikkin er størri enn nakratíð millum luttakararnar í "politisku skipanini".

Við makrelinum kom reiðilig gongd á nýhugsanina í fiskivinnupolitikkinum við ikki minni enn tveimum kunngerðum og einari nýggjari lóg innan fyri ein mánað. Tann 4. mai 2011 kom ein kunngerð um veiðu eftir makreli, ið ásetti býtið av teimum 150.000 tonsunum, ið vóru ásett sum kvota fyri árið, men tá er longu gjørd "Langtíðarsemja frá 20. apríl 2011 millum Samgongu, Tjóðveldi og Framsókn" um hvussu føroyska kvotan skal nýtast. Í hesi semjuni (sum kortini ikki bleiv so langlívað), eru tvey heilt nýggj fyribrygdi, nevniliga avgjald (tilfeingisgjald?) og uppboðssøla, ið onga heimild høvdu í galdandi fiskivinnulóg. Hendan nýggja "makrelsamgongan" bar skjótt at, og tann 8. juni 2011 kom nýggj "lóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011", har gjald varð álagt einum parti av vinnuni og ein partur av kvotuni skuldi seljast á uppboði, meðan aðrir einki skuldu lata fyri hesa fólksins ogn. Longu tveir dagar seinni nýggj kunngerð um tað sama. Av sonnum ikki drúgv tíð at fyrireika tvær so kollveltandi nýskipanir fyri høvuðsvinnuna.

Makrelsamgonguni var ikki lív lagað, og eftir valið fingu vit nýtt landsstýri við tí útkoyrda (ella-farna?) liberala fólkaflokkinum aftur at tí sosial-liberala sambandsflokkinum. Hetta sást eisini partvíst í samgonguskjalinum, har tað – umframt klassikaran um at "fiskivinnulóggávan verður dagførd og gjørd einfaldari" - eru nøkur orð um tíðaravmarkaða/rullandi skipan sum skal gerast saman við fakfólki, og tilfeingis-/loyvisskatt, líkur tí, sum er galdandi fyri 2011 (t.v.s. 2,5 prosent eykaskatt av skattskyldugum vinningi í fiski- og alivinnuni omanfyri 1 mió kr, og sum varð mett at geva einar 25 mió. í eykaskatti). Tá avtornaði komu 7,8 mió. burturúr, hvørki meira ella minni.

Nýsetti landsstýrismað-